NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

**TØKNIFRÁGREIÐING**
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Haruveiðan í Føroyum

# 2012

Hunting of hare in the Faroe Islands in 2012

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 2013:02

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Faculty of Science and Technology University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Haruveiðan í Føroyum 2012**

*Hunting of hare in the Faroe Islands in 2012*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/Technical Report

*NVD*Rit 2013:02

© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya

Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)

Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)

☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Innihaldsyvirlit**

1. Samandráttur ........................................................................................ Síða 4

2. Haruveiða í Føroyum ........................................................................................ 5

3. Innsavning av veiðitølum ........................................................................................ 6

3.1 Hvussu fullfíggjað er kanningin? ........................................................ 7

4. Hvussu nógvar harur vórðu skotnar í 2012? ................................................ 9

4.1 Hagapartar ........................................................................................ 9

4.2 Oyggj ........................................................................................ 10

4.3 Bygd ........................................................................................ 10

4.4 Útvaldir dagar ........................................................................................ 11

5. Hvussu stórur er føroyski harustovnurin? ................................................ 12

6. Innannøring ........................................................................................ 13

7. Haruskjóting í Hesti ........................................................................................ 14

8. Hvør skeyt flestar harur í 2012 ........................................................ 15

9. Hvussu nógv vigar ein føroysk hara? ................................................ 16

10. Eldri harutøl ........................................................................................ 18

10.1 Haruveiða í Fuglafirði ........................................................................ 19

10.2 Sundshagin, Uttari partur ................................................................ 20

10.3 Klappjakt í Trongisvági ................................................................ 21

10.4 Nólsoy ........................................................................................ 22

10.5 Vágar ........................................................................................ 23

10.5.1 Sandavágur ................................................................ 24

11. Haruhundur ........................................................................................ 25

12. Heimildir ........................................................................................ 27

**Appendix**:

Úrslitini frá teimum einstøku harutúrunum í Føroyum í 2012:

Skipað eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato ........................................ síða 28 - 44

## 1. Samandráttur

Hetta er ein fyrsta roynd, at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum.

Í yvirlitinum eru tilsamans 5.381 harur skrásettar at vera skotnar í Føroyum í 2012. Men yvirlitið er tíðan verri ikki fullfíggjað, tí tað eru uttan iva fleiri harutøl, sum tað ikki hevur eydnast mær at fáa fatur á. So helst er samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2012 omanfyri 7.000.

Nú var 2012 eitt serstaka vánaligt ár til haru. Flestu harumenn, sum eg havi tosað við siga, at teir bara hava fingið umleið helvtina av tí, sum teir vanliga plaga at fáa. Er hetta rætt, verða eitt miðal ár skotnar dupult so nógvar, t.e.14.000, harur í Føroyum. Siga vit, at helvtina av harustovninum verður skotnar á hvørjum ári, so var samlaði føroyski harustovnurin í 2012 umleið 14.000 harur. Eitt miðal ár er harustovnurin kanska tað dupulta .

Raskastir at skjóta harur í 2012 vóru teir í hagapartinum Norðurtriðingur, Norðari partur í Sørvági. Teir fingu tilsamans 120 harur á 10 túrum. Teimum á baki komu teir á Skálatoftum á Borðoynni við 116 harum, sum teir fingu á 8 túrum. Á triðja plássi vóru teir á Dúvugørðum í Saksun við 110 harum, eisini á 8 túrum.

Flest harurnar vórðu skotnar í Streymoynni, íalt 2.511 harur, sum er 47% av samlaða talinum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2012. Í Vágum vórðu skotnar 948 harur, í Eysturoynni 567 og á Borðoynni 447 harur.

Vestmanna er tann bygdin í Føroyum, har flestu harurnar vórðu skotnar í 2012. Tilsamans vórðu skotnar 429 harur í teimum 10 haruhagunum, sum hoyra til bygdina.

Í 20 teimum bestu haruhagunum í Føroyum vórðu skotnar tilsaman 1.693 harur, sum er 31% av samlaðu veiðuni í 2012. Í 2012 var fyrstu ferð, at teir skutu harur í Hesti. Teir vóru tveir túrar, og fingu tilsamans 25 harur.

Fyrsta leygardag í harutíðini vórðu skotnar tilsaman 831 harur í 61 høgum kring landið. Hetta er 19% av samlaðu haruveiðini, og 11% av túratalinum. Seinasta dag vórðu skotnar tilsamans 628 haru í 95 høgum.

Yvirlitið byggir á úrslit frá 649 einstøkum harutúrum, sum vórðu gjørdir í 199 ymiskum hagapørtum í 68 bygdum í Føroyum. Upplýsingarnir eru fingnir til vega frá tilsamans 183 ymiskum heimildarfólkum kring landið.

Innsavningin av veiðitølunum í hesi frágreiðingini byggir á upplýsingar, sum eru fingnir frá harumonnum kring landið. Innsavningin av veiðitølum er í størstan mun farin fram við Facebook-bólkinum “Haruskjóting í Føroyum”. Eftir at veiðitíðin var liðug, var eisini ringt til bøndur og harumenn, sum eg var vitandi um, ella hevði frætt um, høvdu skotið harur í 2012.

## 2. Haruveiða í Føroyum

Tað finst einki samlað yvirlit um, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Vanligt er, at haruhagar verða seldir, nakað áðrenn harutíðin byrjar. Eisini er vanligt, at fjallmenn sleppa at skjóta hjá bóndanum, har teir ganga á fjall.

Haruveiðan í Føroyum er skipað sambært løgtingslóg nr. 128 frá 25. oktober 1988 um haruveiðu (http://logir.fo/foldb/llofo/1988/0000128.htm). Lógin er sera stutt, einans tvær greinar, umframt sektarmøguleikar og gildiskomu. Í grein eitt verður ásett, at loyvt er at skjóta haru í tíðini 2. november til 31. desember, báðar dagar viðroknaðar. Stykkið tvey og trý í greinini umrøður møguleikar at friða. Í grein tvey verður sagt, at haruveiðan má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvt er bert at nýta høglbyrsu. Annars eru ongar bindingar í lógini, og tað er í veiðutíðini frítt hjá harumonnum at skjóta í tí hagapartinum, har teir antin hava fingið ella keypt sær rættindi.

Teir ið skjóta haru, hava ikki skyldu at boða frá, hvussu nógvar harur teir hava fingið, hvussu ofta teir hava skotið ella hvussu nógvir mans hava verið við. Tá vita vit ikki, hvussu nógv harur verður skotin í Føroyum á hvørjum ári, ella hvussu stór royndin er. Tað eru tó nógvir harumenn, sum hava stóran áhuga fyri haruveiðu, og skrivað tí niður, hvussu nógvar teir fáa; antin fyri hvønn einstakan dag, sum skotið hevur verið, ella samlað talið av harum, sum vórðu skotnar í veiðitíðini. Hesar upplýsingar um haruveiðu liggja ymsastaðni kring landið, uttan tó at vera savnaðir saman.

Hetta er ein fyrsta roynd at fá fatur á hesum upplýsingunum, so til ber at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur veruliga verða skotnar í Føroyum.

Ætlanin er at endurtak hesa uppteljingina komandi ár og vónandi verður yvirlitið fyri haruveiðina fyri 2013 enn meira fullfíggjað.

### 3. Innsavning av veiðitølum

Innsavningin av veiðitølunum í hesi frágreiðingini byggir á upplýsingar, sum eru fingnir frá harumonnum kring landið. Innsavningin av veiðitølum er í størstan mun farin fram við Facebook-bólkinum "Haruskjóting í Føroyum". Hetta er ein afturlatin bólkur, sum 25. januar 2013 hevði 672 limir. Á hesi síðuna skriva limirnir hvussu nógvar harur teir hava fingið hvønn dagin, t.d. kann NN skriva:

> NN:
> 31 desember. Sjóðarhagi, Niðari partur (Kollafirði). 4 mans 17 harur

Hesi tølini verð so førd yvir í eitt rokniark, við hesum upplýsingum:

- Oyggj
- Bygd
- Hagapartur
- Dato
- Tal av harum
- Tal av byrsum
- Heimildarfólk
- Viðmerking

Eftir at veiðitíðin var liðug, var eisini ringt til bøndur og harumenn, sum eg var vitandi um, ella hevði frætt um, høvdu skotið harur í 2012. Harutølini, sum eru við í hesi frágreiðingini, koma frá 183 ymiskum heimildarfólkum kring landið. Samandráttur av úrslitunum frá innsavningini er víst í talvu 1.

| | |
|---|---:|
| Tal av skotnum harum | 5.381 |
| Tal av harutúrum | 649 |
| Tal av hagapartum | 199 |
| Tal av bygdum | 68 |
| Tal av oyggjum | 13 |
| Tal av heimildarfólkum | 183 |

***Talva 1:*** *Upplýsingar um harutølini, sum vórðu savnaði saman fyri veiðitíðina 2012.*

Umframt upplýsingar frá teimum 649 einstøku túrunum, sum vórðu skrásettir, eru eisini upplýsingar fyri samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í 12 øðrum hagapøtum.

### 3.1 Hvussu fullfíggjað er kanningin?

Í hesi kanningini havi eg ikki fingið fatur á tølunum, um hvussu nógvar harur vórðu skotnar í Føroyum í 2012. Spurningur er so, hvussu stórum parti av veiðitølunum, sum tað er eydnast mær at fáa fatur á? Fyri at meta um hetta, havi eg talt saman, hvussu nógvir hagapartar tilsamans eru í Føroyum. Til at gera hetta yvirlitið, havi eg brúkt heimasíðuna hjá Kára Torsteinssyni http://www.heimabeiti.fo/. Úrslitini eru víst í talvu 2. Yvirlitið vísir talið av hagapørtum á hvørjari oyggj, sum eg havi harutøl frá í veiðutíðini 2012, samanborið við, hvussu nógvir hagapartar tilsamans eru á oynni.




**Mynd 1:** *Yvirlit yvir hagapartar í Føroyum, býttir millum kongs- og óðalsjørð.*

Í Føroyum eru tilsamans 472 hagapartar (Mynd 1 og Talva 2). Flest hagapartar eru í Eysturoynni (114), Suðuroynni (86) og í Streymoynni (82). Í kanningini eru harutøl fingin fyri tilsamans 199 hagapartar, sum svarar til 42 % av øllum høgunum í Føroyum.

Streymoyggin er tann parturin av landinum, sum er best umboðaður í kanningini. Har eru harutøl fingin til vega fyri 73 hagapart, sum svarar til 89% av øllum hagunum í oynni. Næst kemur Borðoyggin (73%) og so Viðoyggin (71%). Eysturoyggin er tann parturin av landinum, sum er ringast umboðaður í kanningini. Tað hevur bert eydnast mær at fingið fatur á harutølum frá 26 av teimum 114 høgunum, sum eru í Eysturoynni. Tað svarar til 23 % av hagunum í oynni.

Ætlanin er sum sagt, at endurtaka teljingina komandi ár, so standa vit tá saman, kann úrslitið gerast upp aftur betur í 2013.

| **Oyggj** | **Tak av markatals-bygum** | **Tal av hagum** | | **%** |
|---|---|---|---|---|
| | | **pr. oyggj** | **við haru-tølum** | |
| Fugloy | 2 | 10 | 0 | 0 |
| Svínoy | 1 | 8 | 2 | 20 |
| Viðoy | 2 | 14 | 10 | 71 |
| Borðoy | 8 | 26 | 19 | 73 |
| Kunoy | 3 | 10 | 5 | 50 |
| Kalsoy | 4 | 21 | 8 | 38 |
| Eysturoy | 20 | 114 | 26 | 23 |
| Streymoy | 19 | 82 | 73 | 89 |
| Vágar | 5 | 40 | 26 | 65 |
| Mykines | 1 | 5 | 0 | 0 |
| Koltur | 1 | 1 | 0 | 0 |
| Hestur | 1 | 3 | Øll oyggin | - |
| Nólsoy | 1 | 3 | Øll oyggin | - |
| Sandoy | 5 | 42 | 6 | 14 |
| Skúvoy | 1 | 5 | 1 | 20 |
| Stóra Dímun | 1 | 1 | 0 | - |
| Lítla Dímun | 0 | 1 | 0 | - |
| Suðuroy | 10 | 86 | 21 | 24 |
| **Samlað** | **85** | **472** | **199** | **42** |

***Talva 2**: Tal av markatalsbygdum á hvørjari oyggj og talið av hagapørtum, sum hoyra til bygdirnar. Høgrumegin sæst talið av hagapørtum, sum eru við í uppteljingini av haruveiðini í Føroyum í 2012, og hvussu stóran prosentpart hetta svarar til, í mun til talið av høgum, sum eru í oynni. Markatalsbygdir eru bygdir, ið nevndar eru í elstu jarðarbókum.*

## 4. Hvussu nógvar harur vórðu skotnar í 2012?

Sambært skrásetingin, vórðu tilsaman 5.381 harur skotnar í Føroyum í 2012. Hetta talið er tó ikki fullfíggjað, tí tað eru uttan iva fleiri harutøl, sum tað ikki er eydnast mær at fáa fatur á. Hvussu nógv tøl mangla, veit eg ikki, men siga vit, at eg havi fingið fatur á trimum fjórðingum av samlaðu veiðuni, so vórðu tilsamans umleið 7.000 harur skotnar í Føroyum í 2012.

Í umrøðuni av haruveiðini í Føroyum fyri árið 2012, sum kemur niðanfyri, verður støði tikið í teimum 5.381 harunum, sum eru skrásettar í hesi kanningini, hóast hetta ikki eru allar harurnar, sum vórðu skotnar i Føroyum í 2012.

### 4.1 Hagapartar

Raskastir at skóta harur í Føroyum í 2012 vóru teir Norðurtriðingur, Norðari partur í Sørvági. Teir fingu tilsamans 120 harur á 10 túrum (Talva 3 og Appendix 1). Teimum á baki komu teir á Skálatoftum á Borðoynni við 116 harum, sum teir fingu á 8 túrum. Á triðja plássi vóru teir í Dúvugørðum í Saksun við 110 harum, eisini á 8 túrum. Úrslitið fyri teir 20 bestu haruhagarnar í Føroyum í 2012 er víst í talvu 3. Í hesum 20 haruhagunum vórðu skotnar tilsaman 1.693 harur, sum svarar til 31% av samlaða talunum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2012.

Úrslitini frá teimum einstøku harutúrunum í Føroyum í 2012, skipað eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato er víst Appendix á síðu 28 - 44.

| Hagapartur | Bygd | Samlaða talið av skotnum harum | Tal av túrum |
|---|---|---|---|
| 1. Norðurtriðingur, Norðari partur | Sørvágur | 120 | 10 |
| 2. Skálatoftir | Skálatoftir | 116 | 8 |
| 3. Dúvugarðar | Saksun | 110 | 8 |
| 4. Presthagi, Heimara gonga | Kvívík | 105 | 14 |
| 5. Uttan Hús á Fjøllum | Miðvágur | 101 | ikki uppgivið |
| 6. Fyri Norðan | Kunoy | 96 | 7 |
| 7. Sjeyndir | Tjørnuvík | 91 | 8 |
| 8. Fyri Norðan Á | Eiði | 90 | ikki uppgivið |
| 9. Dalar, Eystanfyri | Vestmanna | 88 | 3 |
| 10. Fyri Innan | Skarð | 87 | 4 |
| 11. Úti í Haga á Bjørgum | Vestmanna | 85 | 5 |
| 12. Leynahagi, Uttan fyri Húsini | Leynar | 83 | 6 |
| 13. Dúvugarðar | Saksun | 80 | 3 |
| 14. Skarðhamar | Hvannasund | 71 | 3 |
| 15. Bergsmunnin | Viðareiði | 70 | 8 |
| 16. Kirkjubøhagi, Fyri Heiman | Kirkjubøur | 62 | 3 |
| 17. Botnar | Funningur | 62 | 11 |
| 18. Syðradalshagi | Syðradalur S | 60 | 3 |
| 19. Sjóvarhagi, Fremri partur | Kollafjørður | 58 | 10 |
| 20. Norðan Á | Haldarsvík | 58 | 11 |
| **Tilsaman** | | **1.693** | **125** |

***Talva 3**: Talvan vísir teir 20 hagapartarnar, har flestar harur vórðu skotnar í 2012. Eisini sæst hvussu nógvir túrar vórðu gjørdir í hesum hagapørtunum. Tær 1.693 harurnar, sum vórðu skotnar í hesum 20 hagapørtunum, svarar til 31% av samlaða talinum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2012.*

## 4.2 Oyggj

Flest harurnar í 2012 vórðu skotnar í Streymoynni, íalt 2.511, sum svarar til 47% av teimum 5.381 harunum, sum íalt vórðu skotnar í Føroyum í 2012 (Mynd 2). Tað var eisini á Streymoynni, at flestu túrarnir vórðu gjørdir, íalt 293 túrar, sum svarar til 45% av samlaða túratalinum í 2012. Í Vágum vórðu íalt skotnar 948 harur, 567 í Eysturoynni og 447 a Borðoynni.

Til samanberingar fyri Vágoynna, kann sigast, at árini 1991 og í 1997 vórðu umleið 1.400 haru skotnar tilsamans Vágunum um árið (Sí talvu 4 og 5 í hesi frágreiðingini).




***Mynd 2:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur tilsamans vórðu skotnar (vinstrumegin) og hvussu nógvir harutúrar tilsamans vórðu gjørdir í hvørjari oyggj 2012 (høgrumegin).*

## 4.3 Bygd

Vestmanna er uttan iva tann bygdin í Føroyum, har mest verður gjørt burtur úr haruskjóting. Hetta sæst eisini aftur á prísunum, sum hagarnir verða seldir fyri.

Vestmanna var eisini tann bygdin, har flestu harurnar vórðu skotnar í 2012. Tilsaman skutu teir 429 harur á 31 túrum í teimum 10 haruhagunum, sum hoyra til bygdina (Mynd 3). Næst flestar harur skutu teir í Sandavági, 320 harur á 45 túrum. Á triðja plássi er Sørvágur við 292 harum á 36 túrum, og á fjórða plássi er Kvívík við 243 harum á 34 túrum.

Í partinum um eldri harutøl aðrastaðni í hesi frágreiðingini (partur10.5.1) sæst, at árini 1970-1986 vórðu í miðal 450 harur skotnar í Sandavági. Tær 320 harurnar, sum í 2012 vórðu skotnar í Sandavági eru tískil munandi færri enn tað, vanliga verður skotið í Sandavági. Hetta var sum heild eisini galdandi fyri alt landið í 2012. Flestu harumenn, sum eg havi tosað við siga, at samlaða talið av harum sum teir fingu í 2012, var bert helvtina av tí, sum teir vanliga fáa.




***Mynd 3:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í tíggju teimum bestu bygdunum í Føroyum í 2012 (vinstrumegin), og hvussu nógvir harutúrar vórðu gjørdir í hesum bygdunum (høgrumegin).*

## 4.4 Útvaldir dagar

Hóast tað í Føroyum er loyvt at skjóta haru einar 50 dagar um árið, so verður tó mest skotið leygardagar. Á mynd 4 er víst, hvussu veiðan var 11 ávísar dagar í veiðitíðini: Fyrsta dag, 8 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og so seinasta dag, loyvt er at skjóta haru.

Av teimum tilsamans 583 harutúrunum, har dato er givið, vórðu íalt 3.079 harur skotnar (69%) hesar 11 dagarnar og 60% av túrunum vórðu gingnir.

Fyrsta dag vórðu tilsamans 432 harur skotnar í 30 hagapørtum kring landið. Hetta eru 10% av teimum skotnu harunum og 5% av samlaða túratalinum í 2012. Fyrsta leygardag, sum loyvt var at skjóta (3. november), vórðu skotnar tilsaman 831 harur í 61 høgum. Hetta er 19% av skotnu harunum, og 11% av samlaða túratalinum. Triðja jóladag vórðu skotnar 362 harur í 51 høgum. Seinasta dag vórðu skotnar tilsamans 628 haru í 95 høgum, sum svarar til 14 % av teimum skotnu harunum í 2012 og 16% av øllum túrunum. Leygardagarnar 15. og 22. desember var lítil aktivitetur. Tilsamans vórðu einans 31 harur vórðu skotnar hesar báðar leygardagarnar á 8 túrum.




***Mynd 4:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar 11 ávísar dagar í 2012 (vinstrumegin), og í hvussu nógvum hagapartum, skotið varð í (høgrumegin). Talan er um fyrsta dag, 8 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og so seinasta dag, loyvt er at skjóta haru (31. desember).*

## 5. Hvussu stórur er føroyski harustovnurin?

Tav verður ofta havt frammi, hvussu nógvar harur munnu verða skotnar í Føroyum um árið og hvussu nógvar harur tað munnu vera í Føroyum tilsamans. Tað er tó ikki møguligt at svara hesum spurninginum, tí tað finst eingin skráseting av, hvussu nógv verður skotið, og tað er heldur ikki gjørd nøkur nágreinilig kanning av, hvussu stórur føroyski harustovnurin er.

Í bókini "Villini súgdýr í Útnorðri" verður sagt (s.177), at hildið verður, at føroyski harustovnurin er einar 5.000 harur. Hetta talið er tó alt ov lágt, tí sambært mínum tølum, havi eg skrásett 5.381 harur at verða skotnar í Føroyum í 2012. Hóast hetta talið kanska sær út til at vera stórt, so er tað bert eitt minsta tal av samlaðu haruveiðini fyri 2012, tí tað eru uttan iva fleiri tøl, sum eg ikki havi fingið fatur á.

Hvussu nógv tøl mangla, veit eg ikki, men siga vit, at eg havi fingið fatur á 75% av samlaðu veiðuni, so vórðu tilsamans umleið 7.000 harur skotnar í Føroyum í 2012.

Nú var 2012 á serstaka vánalig ár til haru. Flestu harumenn, sum eg havi tosað við siga, at teir bara hava fingið umleið helvtina av tí, sum teir vanliga plaga at fáa. Er hetta rætt, verða eitt miðal ár skotnar dupult so nógvar harur, t.e. 14.000 harur.

Siga vit, at helvtin av stovninum verður skotin á hvørjum ári (hetta er tó eisini óvist), ber til at gera eina varliga meting av, at føroyski harustovnurin í 2012 var umleið 14.000 harur. Undir somu fortreytum, sum nevndar eru oman fyri, er føroyski harustovnurin sostatt eitt miðal ár umleið 28.000 harur.

Metingin av støddini á føroyska harustovninum, sum er gjørd omanfyri, skal tó takast við einum ávísum fyrivarni, tí báðar av fortreytunum, sum metingin byggir á (hvussu stóran part av veiðuni eg havi fingið fatur á og hvussu stórur partur av samlaða stovninum verður skotin á hvørjum ári) eru ókendar.

Tað kann tó staðfestast, at føroyski harustovnurin er munandi størri enn tær 5.000 harurnar, sum sagt verður í bókini "Villini súgdýr í Útnorðri".

## 6. Innannøring

Javnan verður havt á munni millum harumenn, at føroyski harustovnurin hevur trupulleikar av innannøring. Sum so mangan, so eru enn ongar kanningar gjørdar av hesum í Føroyum, og tí ber ikki til at staðfesta, um hetta veruliga er ein trupulleiki. Tað ber tó til at gera ein meting av hesum, sum byggir á royndir og kanningar, sum eru gjørdar aðrastaðni.

Innannøring (DK: indavl, EN: inbreeding) kemst av, at dýr ella plantur, sum eru tætt skild, fá avkom saman. Hetta viðførir millum annað til, at:

- Deyðiligheitin økist
- Nøringsevnið lækkar (Hvør hara leggur í miðal sjáldnari og fær færri ungar hvørja fer)

Hetta førir við sær, at stovnurin kann minka. Spurningurin er so, hvussu fá individ skulu vera í stovninum, áðrenn hetta gerst ein trupulleiki. Spurningurin er ikki so léttur at svara, tí tað valdast alt eftir, hvørjir teir genetisku eginleikarnir eru, sum verða førdir víðari í stovninum. Men vanligt er, at færri individ eru í stovninum, størri gerst trupulleikin.

Skilt verður ofta í millum stutttíðarávirkan og langtíðarávirkan av innannøring. Fyri at umgangast stutttíðartrupulleikar, verður ofta sagt, at stovnurin skal vera størri enn 50 individir. Men í longdini (t.e. 100 til 1000 generatiónir) skal stovnurin verða størri enn 500 individir (Siegesmund 1993).

Hvussu er so vorðið við føroyska harustovninum? Um metingin av føroyska harustovninum, sum er gjørd í hesi frágreiðingini, er røtt, so telur føroyski harustovnurin meir enn 20.000 harur. Er hetta rætt, so skuldi innannøring sostatt ikki verið nakar trupulleiki fyri Føroysku haruna.

Her skal tó havast í huga, at hesar 20.000 føroysku harurnar kunna ikki renna runt og para seg við hvørjari aðrari, tí tær eru bundnar at oynni, har tær í síni tíð vóru lagdar. Sostatt hava vit í minsta lagi 16 sjálvstøðugar harustovnar í Føroyum (Eingin hara er í Koltri ella í Lítlu Dímun). Men í veruleikanum eru føroysku harustovnarnir helst upp aftur meira sundurbýttir, tí hóast harurnar á einari oyggj, t.d. Eysturoynni, kunna renna runt á oynni, so gera tær tað bert í lítlan mun. Harurnar halda seg fyri tað mest í einum avmarkaðum øki, og tí vita vit ikki, hvussu nógv "nýggj" gen á hvørjum ári koma til eina bygd ella ein hagapart , t.d. til Eiðis ella í Eiðiskoll.

Tað er tó mín meting, at sum heild er innannøring ikki er ein trupulleiki fyri føroyska harustovnin, í øllum førum ikki á teimum størru oyggjunum.

## 7. Haruskjóting í Hesti

Í 2012 var fyrstu ferð, at teir skutu harur í Hesti. Teir vóru tveir túrar 10. november, tá fingu teir 12 harur og so aftur 24. November, tá fingur teir 25 harur. Sostatt vórðu 37 harur skotnar í Hesti í 2012.



***Mynd 5:*** *Úrslitið frá haruskjótingini í Hesti 24. november. Tilsamans vórðu 25 harur skotnar hendan dagin (Mynd: Ólavur Danielsen).*

## 8. Hvør skeyt flestar harur í 2012

Í mínari innsavningini av harutølum, er bert skrásett, hvussu nógvar harur vóru skotnar í hvørjum hagaparti hvønn dagin. Einki verður sagt um hvussu nógvar harur hvør einstakur harumaður hevur skotið.

Í Facebook síðuni "Haruskjóting í Føroyum", er tað tó onkur, sum hevur gjør vart við seg. Tað sær út , sum tað serliga eru tveir mans sum skara fram úr. Tann eini hevur skotið 68 harur á 7 túrum, meðan hin hevur skotið 42 harur á 14 túrum.

Men samanborið við Cornelius Reinert í Kaldbak, er hetta tó lítið at reypa av. Í Fuglaframa frá 1902 skrivar Sverri Patursson:

> "*Cornelius hevur skotið í 44 ár. Hann byrjaði at reika við byrsuni sum 13 ára piltur; nú er hann 57. Mangan fuglin og manga haruna hevur hann niðurlagt. Hann hevur skotið 500 harur á einum ári." „Fyrst, ið eg fór at skjóta, vóru fyri uttan meg bara tveir ella tríggir mans í Streymoynni, sum gingu á haruveiði. Tá komu harurnar til 18 merkur* (ein mørk er 250gr, tvs. 18 merkur eru 4,5 kg, mín viðmerking)*, meðan tær nú sjáldan koma til 14-15. Og tá vóru tær snjóhvítar, meðan tær nú eru bláar. Ikki uttan hendinga hara er nú heilt hvít*."

Jú, sanniliga vóru teir raskir fyrr í tíðini.

## 9. Hvussu nógv vigar ein føroysk hara?

Á mynd 6 er víst hvussu nóg ein føroysk hara vigar. Myndin er frá Dorete Bloch, og byggir á haruvektir, sum hon gjøgnum tíðina hevur savnað saman gjøgnum, ymsastaðni frá kring landið. Myndir vísir, at miðalvektin á einari vaksnari haru liggur um 3 kg, nakrar fáar liggja millum 3500 og 3800 g, men tann størsta haran sær út til at hava viga yvir 5 kg.




***Mynd 6:*** *Vektin á føroyskum harum, býtt sundur á aldursbólkar ( ungar harur, hálvvaksnar og vaksnar). Myndin er frá Dorete Bloch, og byggir á haruvektir, sum hon hevur savnað saman gjøgnum tíðina ymsastaðni frá kring landið.*

Spurningurin um vektina á føroyskum harum varð viðgjørdur í Facebook síðuni "Haruskjóting í Føroyum". Niðanfyri eru nakað av tí, sum harumenn skrivaðu á síðuna:

"*Eg fekk 2 á Leitið (Viðareiði) ein dagin, onnur vigaði 4 kg og hin 3,8 kg . Tað eru størstu harur, eg havi fingið......*"

"*... eg vigaði allar 12 sum eg fekk 31. desember 2012.Tær vigaðu 2700 gramm í snitt. Tað var i Kunoy. Tær størstu vigaðu 3000 gramm. Var ein annan dagin i somu hagunum. Fekk 9, tær vigaðu 30 kilo við sekki. Veit ikki snittið. Tað var tíðliga í harutíðini, kanska tær fara aftur, sum tað liður út .Vit vigaðu i eina tíð fyri Heiman i Gerðum, sum liggur a Borðoy. Tær lógu um 2500 í snitt.*"

"*Eg havi í nøkur ár vigað tær harur, eg havi fingið í mín part. Allar skotnar í Sandavági. Eg brúki ein vanliga tálgarbismara, sum telur merkur. Ein mørk er hálvt pund, tvs. 250 gr. Meðalvektin í vetur er 11,2 merkur ella gott fimm og eitt hálvt pund. T.v.s umleið 2,8 kg. Tá vóru tvær heilt lítlar uppií, sum vórðu skotnar fyrsta dag. 8 merkur - 2 kg - hvør. Restin liggur úr 10 upp í trettan merkur. Í 2009 havi eg fingið eina, sum vigaði 14 merkur, sum er 3,5 kg. Annars minnist eg, at einaferð tá eg var smádrongur, skeyt pápi mín eina haru, sum vigaði 16 merkur - 4 kg - (sami bismari) uppi í Kolli á Eiði. Tað er so tann burtur úr størsta, eg havi hoyrt um.*"

“*Eg eri sera áhugaður í haruvekt/stødd. Síggi at onkur fær harur upp í 4200 g. Vit skjóta í Sundshaganum, og har er sjáldsamt at fáa haru, sum vigar meiri enn 3500 g. Eru harurnar størri norðanfyri ?*”

“*Haran í Kollinum vigar vanliga 2,5 kg, meðan haran í hinum høgunum er eitt vet størri uml. 3 kg. Ikki ofta nógv meira.*”

“*Tað verður sagt, at harurnar eru størri norðanfyri, og tað ber illa til at koma longur norður enn á Eiðiskoll. Áhugavert. Bismari er betur enn fjaðravektir,sum hava eina stóra óvissu.*”

“*Fekk einaferð eina uppá 15 merkur (3,75 kg). Tað er tann størsta eg havi skotið, og eg havi skotið fleiri hundrað harur*”

“*Eg fekk 2 harur sama dag í Malingstindi á Vágoynni, sum vigaðu 4,6 og 4,9 kg. Eg ringdi til Hjørleif Kúrberg, sum skrásetti tað. Hann veit nógv at fortelja um haru*”

“*Ein hara bleiv skotin av Jákup Paula Lassen á Húsum. Hon vigaði 5,5 kg. Eg var sjálvur við tann túrin. Tað skal eg siga tykkum, tað var ein stór hara*”

“*Vit í Sundshaganum hava mátað haruvektir í nógv ár, og fingu í 2011 tvær harur, sum vigaðu 3600 og3700 gramm.....*”

“*Vit skutu Heimanfyri í Dølum, Vestmanna, fyri uml. 3 árum síðan. Har fingu vit eina sum vá 5,0 kg, ein 4,8kg og ein á 4,6 kg. Restin var eitt sindur minni. Haldi vit fingu 24 á alt tann dagin..*.”

“*Veit um eina sum bleiv skotin í Vestmanna sum vigaði 4,6 kg*”

“ *Ein bleiv skotin fyri nøkrum árum síðani í Klaksvík, á Borðoyðanesi/Uppsalahagi . Hon vigaði 5,4kg!! Tað fekk eg mær fortalt í gjár. Eg lúgvi, sum mær er logið. Men hon skuldi so verða tann største sum er komin í Norðoyggjum, segði hann*.”

“*Je havi vigað nógvar harur og í fleiri ár var haran hjá Paula í Garðinum tann tyngsta; 4,2 kg. Men nú hevur Hanus fingið ein tyngri 4,5 kg. Men einaferð hoyrdi eg um eina, sum skuldi vigað 5,6 kg. Um tað var Hans, Eivind ella Petur sum fekk hana, minnist je ikki.*”

## 10. Eldri harutøl

Fleiri staðni hevur tað verið vanligt, at harumenn skriva niður, hvussu nógvar haru verða skotnar, antin á hvørjum túri, ella samlað fyri alla veiðitíðina. Tað hevur eydnast mær at fingið fatur á nøkrum av hesum veiðutølunum. Við loyvi frá hesum monnum verða hesi veiðitølini víst niðanfyri. Tað eru uttan iva nógv fleiri, sum liggja inni við tílíkum tølum. Tað hevði tí glett meg almikið, um eg kundi fingið fatur á hesum tølunum. Hetta kann gerast við at senda mær kopi av tølunum, antin úr dagbókini, lummabókini ella listanum, og senda mær tey við postinum á:

Eyðfinn Magnussen
Íslandsvegur 4
Fo-100 Tórshavn.

Ella, um tit hava skrivað tølini inn í eitt rokniark ella onkra aðra elektroniska skipan, so at senda mær tølini við telduposti á teldupostadressuna:

Eydfinnm@setur.fo

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá teimum søguligu harutølunum, sum eg higartil havi fingið fatur á.

### 10.1 Haruveiða í Fuglafirði

Kristin Poulsen, fyrrverandi lærari í Fuglafirði, skrivaði í fleiri ár niður, hvussu nógvar harur vórðu skotnar tilsamans í hvørjum av teimum nýggju hagaunum í Fuglafirði. Tølini eru fyri árini frá 1972 til 1996. Eisini hevur Kristin Poulsen skrivað niður, hvat hvør haruhagi varð seldur fyri. Úrslitini av haruveiðuni í Fuglafirði er víst á mynd 7.

Hesi 22 árini, sum skotið varð, vórðu tilsamans 2.223 harur skotnar í Fuglafirði, í miðal 101 hara um árið. Flestu harurnar vórðu skotnar í Skarðhaga (íalt 540) og í Fjalshaga (íalt 484). Hesi árini vórðu flest harur skotnar í 1986 (174 harur), 1975 (173 harur) og í 1972 (163 harur). Í 1990-unum minkaði áhugin í Fuglafirði fyri haruskjóting, og sást hetta eisini aftur á talinum á harum sum, blivu skotnar, og samlaða tali av skotnum harum í Fuglafirði fór tá niður um 50 harur um árið.







***Mynd 7**: Samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar á hvørjum ári í teimum nýggju haruhagunum, Fuglafirði, árini 1972 til 1996 (ovara myndi). Hesi 22 árin, sum skotið varð, vórðu tilsamans 2.223 harur skotnar í Fuglafirði, í miðal 101 hara um árið. Niðara myndi vísir samlaða talið fyri allar nýggju haruhagarnar í Fuglafirði (Kelda: Kristin Poulsen ).*

### 10.2. Sundshagin, Uttara partur

Í Sundshaganum, uttara parti, hevur so at siga sama manningin skotið á hvørjum ári síðani 1974. Steingrím Samuelsen hevur givið mær tølini yvir hvussu haruveiðan hevur hilnast hesi árini. Á mynd 8 er víst, hvussu veiðan hevur verið fyrsta og annan dag og samlaðu veiðuna fyri alt árið síðani 1978. Hesi 35 árini vórðu skotnar tilsamans 1.089 harur í Sundshaganum, í miðal 31 harur um árið. Mest varð fingið í 2010 (60 harur) og 1991 (55 harur). Ringast var 1983 (11 harur á 5 túrum) og 1993 (13 harur á 4 túrum)




***Mynd 8:*** *Talið av harum, sum er skotnar í Sundshaganum, Uttara parti, Tórshavn, árini 1978 til 2012. Hesi 35 árini vóru skotnar tilsamans 1.089 harur í Sundshaganum, í miðal 31 harur um árið (Myndina eigur Andras L. Samuelsen).*

## 10. 3 Klappjakt í Trongisvági

Flestu staðni í landinum er haruskjótingin skipað á tann hátt, at nakrir mans taka seg saman at skjóta og hesir bera vanliga sjálvir tær harurnar, sum teir skjóta. Í Trongisvági er haruveiðan skipað á serligan hátt, nevnd “Klappjakt”, og hevur hesin háttur verið nýttur í mong ár. Seytjan skjúttar eru við á túrinum. Hvør skjútti hevur ein klappara, hvørs uppgáva er at bera harurnar. Fyrr í tíðini skuldu berararnir eisini klappa harurnar fram (harav navnið klappari), men soleiðis er ikki longur. Nú skulu klappararnir vera friðarligir, tí hildið verður, at betri er at ganga seg framá harurnar, enn at klappa tær fram. Navnið klappari hevur tó hingið við, og verður framvegis brúkt um berararnar.

Skotið verður í fýra hagapørtum (mynd 9). Bert ein túrur verður gjørdum um árið. Millum 8 og 17 skjúttar hava verið við á hvørjum túri, í miðal 14,9. Ein neyvari lýsing av, hvussu klappjaktin er skipað, kann lesast á heimasíðuni: http://www.klappjakt.com/?page_id=143.




***Mynd 9:*** *Á Klappjaktini í Trongisvági verur skotið í fýra hagapørtum: Líðarhaga og Húsgarðshaga við hvør sínum 6 merkum, Riddalshaga (4 merkur 3 gyllin) og* Tvørhagi (1 mørk 8 gyllin).

Gerðabók verður førd yvir haruskjótingina á klappjaktini. Árini 1981 til 2012 vórðu skotnar tilsamans 1.586 harur á klappjaktini. Hetta gevur í miðal 49,6 harur um árið. Úrslitini frá haruskjótingini í Trongisvági eru víst í mynd 10. Besta árið var í 2010, tá 84 harur vórðu skotnar.




***Mynd 10:*** *Talið av harum, sum eru skotnar á Klappjakt í Trongisvági árini 1981 til 2012. Hesi 32 árini eru tilsamans skotnar 1.586 harur. Hetta gevur í miðal 49,6 harur um árið. Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Jens Róa Sørensen og sum standa á heimasíðuni http://www.klappjakt.com*

### 10.4 Nólsoy

Í Nólsoy verður vanliga skipað fyri felags haruskjóting, har skotið verður í øllum teimum trimum hagapørtunum, sum eru í oynni (mynd 11). Vanliga verður bert skotið tann eina dagin. Ein gjøllari lýsing av haruskjótingini í Nólsoy er at finna á heimasíðuni hjá Jens-Kjeld Jensen http://www.jenskjeld.info/artikler/harejagt.htm#FO.




***Mynd 11:*** *Nólsoy er býtt í 3 hagapartar: Heimara helvt (1) - Miðjan/Junkarshagin (2) og Borðan (3). Miðjan/Junkarshagin og Borðan verða eisini í felag kallað Ytra helvt. (Myndina eigur Jens-Kjeld Jensen)*

Úrslitini frá haruveiðuni í Nólsoy árini 1989 til 2012 er víst á mynd 12. Hesi 15 árini eru tilsamans 950 harur skotnar í Nólsoy, í miðal 63,3 harur um árið.




***Mynd 12:*** *Talið av harum, sum eru skotnar á Nólsoy árini 1998 til 2012. Hesi 15 árini eru tilsamans skotnar 950 harur í Nólsoy, í miðal 63,3 harur um árið. Myndin byggir á tøl, sum eru fingin av heimasíðuni hjá Jens-Kjeld Jensen http://www.jenskjeld.info.*

## 10.5 Vágar

Vágoyggin man uttan iva verða tann oyggin í Føroyum, har mest hara er at fáa í mun til støddin á oynni. Gutti Petersen, fyrrverandi lærari í Sandavági hevur verið íðin harumaður og hevur skotið nógva haru. Fyri nøkrum árum síðani royndi hann at samla harutøl fyri alla Vágoynna. Frá Gutta Petersen havi eg fyribils fingið tølini fyri tvey ár: 1991 og 1997.

Tølini fyri 1991 vísa samlaðu veiðuna í teimum fimm bygdunum í Vágunum (Talva 4). Hetta árið var samlaða haruveiðan í Vágunum 1.423 harur.

Í 1997 vórðu skotnar tilsaman 1.393 harur í Vágunum, 358 í Bø og Gásadali, 354 í Sandavági, 291 í Miðvági og 390 í Sandavági (Talva 5).

| Gásadalur | Bøur | Sørvágur | Miðvágur | Sandavágur |
|---|---|---|---|---|
| 74 | 274 | 346 | 280 | 449 |
| **Tilsamans fyri allar Vágar 1.423 harur** | | | | |

***Talva 4:*** *Samlaða talið av haru, sum vórðu skotnar í 1991 í teimum fimm bygdunum, sum eru í Vágunum(kelda Gutti Petersen).*

| **Bøur og Gásadalur** | | **Sørvágur** | | **Miðvágur** | | **Sandavágur** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hagapartur** | **Tal** | **Hagapartur** | **Tal** | **Hagapartur** | **Tal** | **Hagapartur** | **Tal** |
| Kleivar | 45 | Norðurtriðingur | 110 | Uttanhús | 59 | Slættaneshagi | 34 |
| Torvmanshagi, Víkar | 98 | Norðurtriðingur Sunnari partur | 61 | Heimanhús | 23 | Oyragjáarhagi | 59 |
| Uttangarðar Hoygarðshagi | 53 | Úttitriðingshagi Heimari partur | 30 | Kvígandalur | 48 | Sundsahagi | 44 |
| Uttangarðar Niðristovuhagin | 49 | Selvík & Teigarnir | 82 | Tjørndalsegg | 41 | Giljahagi | 23 |
| Líðin | 46 | Sunnari Suðurtriðingur | 26 | Norðaraleitið | 70 | Giljahagi J.P. | 23 |
| Við Garð | 67 | Ytri Suðurtriðingur | 45 | Heimaraleitið | 18 | Dalhagi | 41 |
| | | | | Eggin | 2 | Handastihagi | 38 |
| | | | | Nípan | 26 | Oknadalur | 88 |
| | | | | Dalurin | 4 | Gimbrarnar | 40 |
| **Tilsamans** | **358** | | **354** | | **291** | | **390** |
| **Tilsamans fyri allar Vágar 1.393 harur** | | | | | | | |

***Talva 5:*** *Samlaða haruveiðan í Vágunum í 1997, býtt upp á hagapartar (kelda Gutti Petersen).*

### 10.5.1 Sandavágur

Árini 1970 til 1886 savnaði Leivur Joensen úr Sandavági saman tøl um, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í haruhagunum í Sandavági. Tølini eru fyri 7 hagapartar: Slættanes, Oyrargjógv, Sund, Giljar, Heldarstindur, Malingstindur, Húsafelli. Tølini vórðu send tey til bróðurin, Jákup Sverra Joensen, sum tá var stjóri á Fiskirannsóknarstovuni (núverandi Havstovan). Úrslitini eru víst í mynd 13. Hesi 14 árini, sum tøl eru fyri, vórðu skotnar tilsamans 6.296 harur í Sandavági, í miðal 450 harur. Flest harur vóru skotnar í 1982 (628 harur) og minst í árið eftir, í 1983, tá 313 harur vórðu skotnar.

Til samanberingar kann sigast, at í 2012 vóru 320 harur skrásettar at verða skotnar í Sandavági.




***Mynd 13:*** *Talið av harum, sum vórðu skotnar í haruhagunum í Sandavági árini 1970-1986. Eingi tøl eru fyri 1973. Fyri 1977 er bert upplýst, at tað var nógv hara. Í 1979 var haran friðað. Hesi 14 árini, sum tøl eru fyri, vórðu skotnar tilsamans 6.296 harur í Sandavági, í miðal 450 um árið. Myndin byggir á tøl, sum Leivur Joensen í Sandavági hevur savnað saman, og sent til Fiskirannsóknarstovuna (núverandi Havstovan).*

## 11. Haruhundur

